### Norskur partabrævaserfrøðingur:

# Framgongdin verður stór



*- Alt kann henda komandi ár, sigur Peter Hermanrud*

**- 2009 kann gerast comeback-árið á virðisbrævaskálunum, heldur serfrøðingurin hjá First Securities, norðmaðurin Peter Hermanrud, sambært Business-line**

Norskur partabrævaserfrøðingur gevur her nøkur ráð um, hvussu ein fær part í upp-túrinum, tá hann einaferð kemur.

Fíggjarkreppan hevur bitið helmingin av virðinum á Oslo Børs, síðan tað var lá á tí hægsta. Hinvegin økjast arbeiðsloysi og rentukostnaðir.

Nú kann tíðin fara at nærkast, tá tað aftur kann loysa seg at gera íløgur í partabrøv.

- Er talan um langsiktaðar íløgur er lítil ivi um, at tíðin er komin til hyggja seg um eftir partabrøvum. Eg haldi, at 2009 kemur at verða eitt betri enn miðalár, hóast alt kann henda.

- Ein góð regla er at keypa, tá partabrøvini eru bílig í mun til bókaðan eginpenig og alt umkring sær neiligt út, sigur serfrøðingurin hjá First Securities, Peter Hermanrud, við norska vinnublaðið dn.no.

# Søt søla av bókum

**Eitt yvirlit á heimasíðuni bokasolan.fo í viku 48 vísir, at bókin "Søtt og leskiligt" var tann mest selda hetta tíðarskeiðið.**

**Sambært yvirlitinum yvir 10 tær mest seldu bøkurnar er støðan henda:**

**1) Søtt og leskiligt**
**2) Oddvørsa køku- og dessertdreymar**
**3) Metusalem**
**4) HIN HEIMURIN 1**
**5) Meg minnist**
**6) Saknaði sonurin**
**7) Álmanakkin 2009**
**8) Westerbeek**
**9) Songbók Føroya fólks**
**10) Havnin - fólk og yrki**

**Hinvegin vísir yvir, at Klintrimús er mest selda barnabókin og at Oddvørsa køku- og dessertdreymarnir er mest selda bókin í november mánaði.**














